# Nú fær Emil sín heiður

**"Maðurin, sum gjørdist kendur fyri at endurútgeva Varðan, er sjálvur vorðin ein varði í føroyska samfelagnum", sigur mentamálaráðið í grundgevingum sínum fyri at heiðra hin nú 90 ára gamla nólsoyingin, Emil Juul Thomsen við Heiðursgávu Landsins, sum er uppá 75.000 kr.**

**HEIÐURSLØN**

*Snorri Brend*

– Heiðursgáva Landsins verður latin Emil Juul Thomsen fyri hansara slóðbrótandi arbeiði fyri føroyskar bókmentir og bókaútgávur, sigur Mentamálaráðið í grundgevingunum.

Henda heiðursgávan verður latin einstaklingi, felagi ella fyritøku — t.d. bókaforlagi, tónlistaforlagi ella kóri — sum tøkk og viðurkenning fyri at hava framt avrik, ið hava ella hava havt serstakan t‡dning fyri føroyska list og føroyska mentan og mentanarlív.

Her sigur mentamálaráðið, at Emil Juul Thomsen hevur við forlagi sínum "Bókagarður" seinastu fjøruti árini givið út stórt og ókent tal av gomlum føroyskum verkum í nýggjum hami.

Forlagið hevur givið út Varðan, bókina um Kirkjubømúrin, bókina um listamálaran Mikines, William Heinesen á føroyskum, H. A. Djurhuus, Heðin Brú og Martin Joensen í nýggjum útgávum, nýprent av bókum Regins í Líð, og bøkur eftir Jóannes Rasmussen og Hanus Debes Joensen.

Millum tær mongu bøkurnar finnast eisini bøkur um list eftir Broby Johansen, eins og týddir altjóða klassikarar. Eitt hitt seinasta bragd Emil Juul Thomsens er útgávan av mikla verkinum "Føroya Kvæði".

Tá ið Emil fylti 90 ár 27. november í fjør lýsti, nevndin í Varðanum Emil soleiðis:

"Maðurin, sum gjørdist kendur fyri at endurútgeva Varðan, er sjálvur vorðin ein varði í føroyska samfelagnum".

– Hesi orð ger tilmælisnevndin til síni. Heiðursgávan verður tí latin Emili fyri lívsverk hansara at geva út og harvið varðveita ein stóran og týdningarmiklan part av mentanararvi okkara, verður sagt at enda.

Í samrøðu við Sosialin í sambandi við 90 ára dagin, segði Emil, at hann framvegis hevði ætlanir um nýggjar bókaútgávur.

- Í hjartanum á mær liggur eisini eitt stórt ynski um at geva út eina bók um listamálaran Steffan Danielsen (1922-1976) higani úr bygdini. Tað arbeiðið er í roynd og veru longu farið í gongd.

Ta bókina eri eg øgiliga spentur uppá, tí, skal eg siga tær, - næst eftir Mykines, so er Steffan besti málarin, sum vit føroyingar nakrantíð hava átt, segði Emil í hesi samrøðuni.



*Emil Juul Thomsen er nú umsíðir heiðraður fyri allar bókaútgávur sínar. Hóast nógvar bøkur eru givnar út, so hevur hann enn ætlanir um fleiri bøkur*

*Mynd: Snorri Brend*


Val av limum til UMBOÐSRÁÐIÐ fyri OGNARFELAG TRYGGINGARTAKARANNA

- **Í februar mánaði ár 2006 skulu 12 limir veljast til Umboðsráðið fyri Ognarfelag Tryggingartakaranna. Valið er galdandi í fýra ár.**

  Limir, ið ynskja at verða uppstillaðir til val sum umboðsfólk, skulu boða frá hesum skrivliga til høvuðsskrivstovuna innan 1. februar 2006.

  Fráboðanin skal vera undirskrivað av í minsta lagi 25 stillarum, sum eru limir í felagnum. Ein limur kann bert vera stillari hjá einum valevni, og tað kann bert vera eitt valevni á hvørjum lista.

  Núverandi og fyrrverandi stjórar, starvsfólk í felagnum og teirra hjúnarfelagar ella sambúgvar kunnu ikki veljast sum umboðsfólk.

  Eingin kann virka sum umboðsfólk, um tey eru sett í starv í ella arbeiða fyri virki, sum er kappingarneyti hjá felagnum og tess dótturfeløgum.

- **Allir tryggingartakarar í Tryggingarfelagnum Føroyum P/F eru limir í felagnum.**

  Ognarfelag Tryggingartakaranna er eitt felag við avmarkaðari ábyrgd, hvørs endamál millum annað er, beinleiðis ella gjøgnum annað felag, at eiga partapening í Tryggingarfelagnum Føroyum P/F og øðrum feløgum og annað íløguvirksemi.

  Limirnir velja umboðsfólk at umboða atkvøðurætt limanna á aðalfundi.

  Í Umboðsráðnum eru 23 fólk vald av og millum limirnar í felagnum. Val er annaðhvørt ár (líka árstal) og er galdandi í fýra ár, soleiðis at ávikavíst 11 og 12 av limunum fara frá á hvørjum vali.

  Viðtøkurnar fyri felagið lýsa nærri, hvussu val fer fram og virki felagsins annars. Viðtøkurnar eru at fáa á høvuðsskrivstovuni.

Tórshavn, 3. januar 2006
**Ognarfelag Tryggingartakaranna**
**Stjórnin**

www.sansir.fo

OGNARFELAG TRYGGINGARTAKARANNA
Kongabrúgvin · Postboks 329 · FO-110 Tórshavn
Tel 345600 · Fax 345601 · tf@trygging.fo · www.trygging.fo



Balslev

**BALSLEV SØKIR STARVSFÓLK**

**Vit sóknast eftir sølufólki til Málingadeildina í Byggibúðini.**

**Vit vænta:**
- at tú ert faklærd/ur, men tó eingin treyt.
- ert millum 25-40 ár.
- hevur áræði og góðan hug til handilsarbeiði.
- hevur lætt við at samstarva við onnur, og ert kundavinarlig/ur.

**Vit bjóða:**
- løn samb. S & K
- góðar arbeiðsumstøður.
- góðar arbeiðsfelagar.

Um tú heldur at hetta er nakað fyri teg, so send okkum skrivliga umsókn við møguligum viðmælum.
Best er um tú kanst byrja tann 1. februar.

Fleiri upplýsingar um starvið, fáast við at tosa við Eyðun Hansen, e-mail: eh@balslev.fo.

**pf. Balslevs Timburhandil & Byggibúð**
**Postboks 3309**
**110 Tórshavn**

Balslev ...alt ið til